# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um Leon Gunnar Johannesen

**Føddur 14. november 1988**
**deyður 22. mars 2004**



Eg og Leon Gunnar høvdu nógvar góðar løtur saman. Tá ið vit vóru í føðingardegi hjá honum, spældu vit væl saman, vit beistaðust, flentu og stuttleikaðu okkum.

Vit vóru ofta í Sandvík fyrr hjá ommuni og abbanum. Vit vóru hjá seyðinum við abbanum, vit hoyggjaðu og koyrdu hoyggj við traktorinum hjá abba, tað hildu vit vera stuttligt.

Leygarkvøldið áðrenn ta óhugnaligu hendingina, tosaðu tú og eg saman í TB-húsinum, vit tosaðu um gamlar dagar, tá ið vit vóru í Sandvík, og um hvat abbin lærdi okkum. Teg lærdi hann at reka og fletta seyð, meg lærdi hann at binda, tá flenti tú.

Leon Gunnar var fittur og hjálpsamur drongur. Hann hjálpti til har, ið hann kundi, og hann segði aldri nei, um nakar bað hann um hjálp.

Leon Gunnar eitur eftir pápa mínum Leon. Eg eiti eisini eftir honum, tað er eitt av tingunum, vit høvdu felags.

Mánadagin tann 22. mars hendi ein óhugnalig hending. Eg trúði tí ikki, tá ið eg hoyrdi at tú ikki var ímillum okkum meira. Hvør vildi trúð, at ein so ungur og fittur drongur skuldi blíva tikin frá familjuni og vinum.

Eg vísi stóra samkenslu við Irdi, Teddy, Angeli og restini av familjuni. Má Gud styrkja tykkum í hesi stóru sorg.

**Systkinabarnið Leona L. Johannesen**

## Óli Gaard-Jensen 60 ár



Hósdagin 29. apríl 2004 fyllur Óli Gaard-Jensen á Tvøroyri 60 ár.

Óli er føddur í Danmark tann 29. apríl 1944, sonur Hans og Gretu Gaard-Jensen. Tey fingu tvey børn, eina gentu og ein drong.

Sum 4 ára gamal flutti familian heim til føroyar. Fyrst til Vágs, í Smillum, síðan til Argir.

Sum 30 ára gamal flutti hann til suðuoyar, har hann fann konuna, Fritze Ludvig, dóttir Danjal Johan og Andreu Ludvig. Tey giftust í Tvøroyar kirkju í 1976, og fingu eina dóttir.

Óli er útbúgvin skipskokkur í Vestmannaoyggjunum í Íslandi og hann arbeiðir enn sum skipskokkur.

Føðingardagurin verður hildin leygardagin 1. mai á Traðargøtu 14, Argir.

## Ferðslutrygd nýtt starvsfólk



13. apríl 2004 byrjaði Anna Louisa Joensen at arbeiða hjá Ferðslutrygd.

Anna Louisa er 41 ára gomul og útbúgvin sjúkrasystur. Í tí starvinum hevur hon serliga arbeitt við børnum. Harumframt hevur hon tikið útbúgvingina Natur og aktivitetsvejleder. Seinastu árini hevur hon partvíst arbeitt sum lærari.

Starvið, sum Anna Louisa er byrjað í hálvtíðar og samstundis sum Anna Louisa er sett í starv, er Ása Joensen, sum hevur starvast á Ferðslutrygd síðani 1982, farin í hálva tíð. Ferðslutrygd hevur nú trý starvsfólk, dagliga leiðaran Jón Kragesteen og so omanfyrinevndu.

## Nýtt og kollveltandi regndekk

TÍÐINDASKRIV




Í Skandinavia hava fleiri øki vátar vegir tríggjar av fýra døgum um árið í meðal, og í Føroyum man tað vera fýra av fimm døgum í meðal. Tað vita flestu bilførarar sum tí - sambært dekkframleiðarunum - leggja størstan dent á, hvussu dekkini klára seg á vátum vegi. Stórur munur er á førleikunum at standa fastur á vátum vegi, vísa nýggjastu dekkroyndirnar og -kanningarnar. Hesi úrslit hava elvt til, at nakrir dekkframleiðarar eru farnir at menna serstøk regndekk.

Regndekkið frá GoodYear eitur HydraGrip, sum er skapt til at sleppa undan vatnglíðing (aquaplanning) og at bremsa best møguligt á vátum vegi. Eisini førleikan at halda bilin á rættari kós, tá koyrt verður gjøgnum sving, hevur verið raðfest frammaliga.

Nýggju dekkini skilja seg frá øðrum við, at mynstrið og samansetingin av ymisku tilfarsliðunum er øðrvísi. GoodYear hevur skapt dekkmynstrið út frá tí, vit kenna frá tøknini í nútímans vetrardekkum við lamellum og drenrásum. Tað gevur eina ógvuliga smidliga viðberaflati millum dekk og veg, har nógvir smáir kantar millum smáu lamellirnar skapa neyðugu gníggimótstøðuna (friktiónina) og neyðuga støðufestið.

FDM hevur roynt nýggju dekkini á GoodYear royndarbreytini í Mireval í Suður-frankaríki. Teir siga, at "nýggju dekkni hava eyðsýnt ein betri førleika at standa føst á vátum vegi. Samanberandi bremsuroyndir við nýggju dekkunum og tey hjá kappingarneytunum vístu, at ítøkiligur fyrimunur var við HydraGrip-dekkunum á øllum økjum. Mest undranarvert var ein roynd, har tveir líka bilar - ein bilur við HydraGrip-dekkum og ein bilur við einum dekki frá kappingarneytanum - koyrdu við somu ferð á eini sirkulbreyt, har eitt øki var sprænt við vatni. Í váta økinum var bilurin við HydraGrip-dekkunum næstan óávirkaður, meðan bilurin við dekkunum hjá kappingarneytanum gleið ein heilan metur til síðuna".

Royndin vísir, hvat kann henda, um tú koyrir ígjøgnum eitt vátt sving. Í ringasta føri fer bilurin so nógv til síðuna, at hann kemur yvir í hina koyribreytina ella fer av vegnum. HydraGrip er ment til at halda kósina í slíkum føri.

Super Dekk umboðar GoodYear í Føroyum og hevur HydraGrip-dekkini á goymslu

*Kelda: FDM - Motor nr. 4 apríl 2004*

## Prógv sum miðlatøkningur



Guðrun Heðinsdóttir Mortensen, Tórshavn, hevur tann 29. apríl 2004 lokið prógv í Aalborg, sum miðlatøkningur.

## Dagurin

**30. apríl. Severus.** Var í fimtu øld biskupur í Napoli.



LANGUR LEYGARDAGUR

Í MIÐBÝNUM OPIÐ ER TIL KL. 17.00 1. MAI 2004




Brakandi tilboð
Langan Leygardag

Langar opnar troyggjur
Litir: beige og grønt
fyrr 449,95

Frítt væl 149,95

Seytjan
Í Klaksvík Tel 456517
Í Tórshavn Tel 311305